**9. fl á Sandoyar Meginskúla**

Til Løgtingið

**Løgtingsmál nr. 4/2010: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um valrætt og valbæri**

**Uppskot**
**til**
**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um val til Løgtingið**

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 49 frá 20. juli 1978 um val til Løgtingið, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 47 frá 20. juli 2009, verður gjørd henda broyting:

Í § 2, stk. 1 verður "18" broytt til "15".

**§ 2**

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

**Viðmerkingar**

Viðmerkingar um at seta valrættaraldurin niður í 15 ár

Tá ið Løgtingið varð endurstovnað, og føroyingar skuldu á val, varð vælrættaraldurin ásettur at vera 30 ár. Umframt hetta vóru tað einans mannfólk, sum áttu ávísa ogn, sum sluppu á val. Hetta var í 1852. Í 1854 var valrættaraldurin lækkaður niður í 25 ár, men ognartreytirnar vóru framvegis galdandi, og tað vóru framvegis bara menn, sum sluppu á val. í 1918 var valrætturin gjørdur almennur soleiðis, at ognartreytirnar vórðu tiknar av, og kvinnurnar sluppu eisini á val. Í 1970 varð valrættaraldurin settur niður í 20, og í 1987 var hann settur niður í 18 ár.

Frá 1852 til 1987 er vælrættaraldurin lækkaður úr 30 niður í 18 ár. Samfelagið broytist, og støðan hjá demokratinum hevur laga seg til væltrættin. Vit meta, at tíðin er komin til, at valrætturin verður settur niður í 15 ár.

Tað hevur verið ført fram, at tey ungu eru ov óbúgvin/óvitandi til at taka politiskar avgerðir og fara á val. Valrættur hevur einki við búning ella vitan at gera, men hevur nakað at gera við at taka støðu. Í vallógini er einki krav um at vera búgvin politiskt ella hava serstakan intelligens fyri at taka eina politiska støðu.

Men hinvegin - um vit nú eina løtu spæla, at ein skal vera so og so búgvin fyri at fara á val, so hevur tað at vera politiskt búgvin einki við aldur at gera. Tað eru fleiri 50 ára gomul, sum hava politikst tilvit, sum samsvarar einari hønu, men hesum spyr eingin eftir. Nakað annað er, at vitanarstøðið í samfelagnum hækkar alsamt. Alnótin og tann stríði streymurin av informasjónum gera, at ungdómurin í dag er munandi meira tilvitaður um samfelagsviðurskiftini enn fyri 21 árðum síðan. Harafturat kemur, at ungdómur av bygd ofta flytur heimanifrá longu sum 15 ára gomul fyri at ganga á miðnámsskúla. Tá skulu vit undir øllum umstøðum standa á egnum beinum og taka avgerðir sum vaksin.

Samfelagið er broytt nógv síðan 1987. Tað verður væntað av teim ungu, at tey taka avleiðingar sum vaksin, og tey krøv, sum samfelagið setir teim ungu, eru ikki í samsvari við, at vælrættaraldurin er 18 ár. Sum dømi um hetta kann nevnast, at vit longu í 8. flokki í fólkaskúlanum skulu velja valfak, sum kunnu fáa avleiðingar fyri restina av lívi okkara. Annað dømi er arbeiðsmarknaðurin. 15 ára gomul eru vit flest øll í størri ella minni mun knýtt at arbeiðsmarknaðinum. Har eru ongar sersømdir fyri ung, annað enn at vit fáa minni løn.

Viðvíkjandi tí kriminella lágaldrinum so er eitt vanligt prinsipp í demokratinum, at fólkið sjálvt skal gera av, hvørjum lógum tey verða dømd eftir. Í lógaverkinum verður hildið, at vit eru nóg vaksin at verða dømd sambært lóg, tá ið vit eru 15, men samstundis skulu vit bíða, til vit eru 18, áðrenn vit kunnu ávirka, hvussu lógirnar verða. Vit halda tað vera beinleiðis ódemokratiskt og órættvíst, at vit eru nóg vaksin at dømast, og mátti tað tí verið minsta krav, at vit eru nóg vaksin til at gera av, hvussu lógin skal verða.

Vit meta tað vera eins órættvíst at seta 18 ára aldursmark í dag 2010, og tað var at seta ognarteytir í 1852.

Í skattaviðurskiftum hevur staturin av sínum eintingum gjørt av, at skatturin er tann sami fyri øll. Tað er inntøkan, sum er avgerandi fyri, hvussu nógvan skatt vit skulu gjalda, og ikki aldurin. Eitt annað prinsipp í demokratinum er, at tá ið staturin tekur sær rætt at krevja skatt frá okkum, so skulu vit eisini hava ávirkan á, hvussu hann verður nýttur. Men tað hava vit ikki. Vit hava at gera so væl at gjalda, uttan at hava nakað at skula hava sagt. Hetta er at sammeta við stuldur á alljósum degi.

Søguligi týdningurin av sambandinum millum skattin og demokratiið finna vit við at hyggja eftir amerikonsku søguni. Niðursetufólkinum í USA var álagt at gjalda ensku stjórnini toll av m.ø. tei, sum var flutt inn í USA. Amerikanararnir sýttu fyri hesum við teirri grundgeving, at teir ikki kundu umboða teirra skattakrónur við tað, at tollurin varð nýttur í Onglandi. Stríðið um tollin førdi til amerikonsku frælsisstrýðini, sum Amerika vann, og seinni gjørdist fræls tjóð. Tað var hildið at vera beinleiðis tyranniskt at krevja toll, uttan at amerikanararnir fingu umboðan fyri sín pening. Kenda orðafellið "taxation without representation is tyranny" stavar frá hesum stríðnum.

Tað, sum í 1770-unum var mett sum tyranni í USA, verður framvegis praktiserað hvønn dag her á landi. Hetta uttan at politikararnir rodna ella hava hug at verja tað. Sæð í hesum ljósi, verða vit tyranniserað hvønn dag av almennu Føroyum.

Umboðandi demokrati:
Í flest øllum londum hava vit umboðandi demokrati. Umboðandi demokrati er, at allir partar í landinum sleppa at velja umboð - í prinsippinum vil tað eisini siga, at allir aldursbólkar í landinum skulu umboðast.

Í 2009 vóru tað 2232 ung millum 15 og 17 ár, sum ikki sluppu á val. Hetta er ein rættiliga stórur partur av einum møguligum veljaraskara. Hetta samsvarar við eitt rímiliga stórt valdømi.

Vit meta, at við at geva teimum ungu valrætt, fer tað at styrkja demokratisku støðuna, og tað fer eisini eggja teim ungu til at hava størri áhuga fyri politikki.

Ein gallupkanning, sum varð gjørd í september í fjør, vísti, at greiður meiriluti av danska fólkinum heldur, at tíðin er komin at broyta valrættaraldurin. Tíverri er ein samsvarandi kanning ikki framd her á landi enn, men helst hevði úrslitið verið tað sama.

Við vón um siðiliga viðgerð.

**Á Løgtingi, tann 8. februar 2010**

Paninnguaq Heilmann Birita Poulsen Hergeir W. Lognberg

Marcus Clementsen Arnina Kjærbo Rúni Hentza